**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 1 |
| Tíð: | 22.01.2021 kl. 13.30 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Katrin Holm, forkvinna, Bjørghild Djurhuus, næstforkvinna, Julianna Klett, kassameistari, Marin Rasmussen, limur, og Petur Rouch, skrivari.

**Fundarskrá:**

1. Fyrireiking til fund við borgarstjóran og eldranevndina í Tórshavnar kommunu
2. Ymist

<u>Ad 1 Fyrireiking til fund við borgarstjóran og eldranevndina í Tórshavnar kommunu</u>

Samgonguavtalan hjá meirlutanum í Tórshavnar Kommunu, "Býráðið fyri borgaran" varð gjøgnumgingin. Ráðið kundi gleðast um alt tað positiva, ið var niðurfest í hesa avtalu. Serliga innihaldið um bústaðir, eldraøkið, um umhvørvi og um byggi- og býarskipan nam við viðurskifti, ið Eldraráðið ætlar at arbeiða við og stuðla komandi 4 árini.

Hjartamálini hjá Eldraráðnum, nú tað fer til verka, eru hesi:

- Bústaðarviðurskifti
- Eldraráðið á vangan hjá Tórshavnar kommunu
- Tættari samstarv við býráðið, serliga eldranevndina og trivnaðarnevndina
- Tilhaldið opið um kvøldarnar
- Skipan av tiltøkum av áhuga fyri eldra ættarliðið
- Demensøkið og heimahjálpin, herundir viðurskifti og tørv hjá óhjálpnum borgarum 60-67 ár
- Bíðilistar
- Venjingarmøguleikar fyri eldri
- Atkomumøguleikar fyri eldri og rørslutarnað
- Lendisgøtur
- Eina grønari kommunu (trøð, endurnýtsla etc)
- Bussleiðin
- Størri samskifti við bygdir og oyggjar av hóskandi støðd innan kommunumarkið

Umframt stinga ítøkilig mál seg upp við regluligum millumbilum, sum til dømis lyfta í Tilhaldinum, ljós við summar lendisgøtur, framtíðar nýtsla av Ellisheiminum í V. U. Hammershaimbsgøtu og annað.

**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

<u>Ad 2 Ymist</u>

Eitt samt ráð tók undir við teimum broytingum, ið vóru gjørdar í viðtøkunum fyri Eldraráðið, og samtyktar á býráðsfundi 17. desember 2020.

Ráðið fer at heita á býráðið um sjálvt at skipa fyri Eldradegnum 2021. Tann peningur, ið er játtaður til Eldraráðið, kann so nýtast til onnur endamál, serliga til tiltøk í Tilhaldinum og í bygdunum í kommununi. Tiltøkini eru til gaman og álvara, har fólk uttanífrá vera boðin at luttaka. Nevnast kann Havnin í fimmtiárunum, Arvarættur, Bústaðartrotið, Harmonikukvøld, Tá makin fellur frá og so framvegis.

Vit halda ikki, at tað er rímiligt, at útreiðslurnar til val av eldraráð verða tiknar av játtanini til Eldraráðið, sum ráðið heldur vera í minna lagi framman undan. Somuleiðis halda vit ikki, at Eldraráðið skal rinda fyri Gallupkanningar, sum hava almennan áhuga.

Næsti fundur er ásettur at vera 4. februar 2021 klokkan 13 í Tilhaldinum.

Ætlanin er at hava tiltakslimir við á fundinum, sum verður 18. Februar.

Fundurin lokin kl. 15.30.